# Gera seg út til sjógvaling

**Alistøðin Fútaklettur hevur biðið um loyvi at gera landstøð á havnarlagnum í Miðvági í samband við, at byrjað verður aftur at ala á vágni**

ALING
*Edvard Joensen*



*Alistøðin Fútaklettur hevur biðið um loyvi at gera landstøð í gamla rækjuvirkinum í Miðvági. Økið verður byrgt av frá umheiminum og skal virka sum slúsa til og frá aliringunum á vágni. Ringanrir, sum liggja í havnini, verða í næstu viku lagdir út á sjálvt aliøkið*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Alistøðin Fútaklettur í Sandavági hevur søkt Miðvágs og Sandavágs kommunur um loyvi at gera eina sonevnda landstøð í bygninginum, sum í síni tíð hýsti rækjuvirkinum á havnarlagnum í Miðvági.

Ein landstøð er í grundini eitt slag av karantenustøð, greiðir Atli Gregersen, stjóri á Fútakletti, frá. Ella ein støð, har øll ferðsla til og frá aliringunum, sum fyrsta dagin verða lagdir út aftur á vágna, skal ganga ígjøgnum.

Ætlanin er, greiðir Atli Gregersen frá, at hegna eitt ávíst øki á bryggjuni av, soleiðis at avgjørt eingin óviðkomandi sleppur fram at økinum. So skal øll ferðsla, sum hevur við ringarnar at gera, ganga gjøgnum tann partin av bygninginum, sum Fútaklettur fer at brúka.

Bátarnir skulu so leggja at við bryggjukantin innan fyri avhegnaða strekkið. Og tað skal haldast sera strangt, leggur stjórin dent á.

Eingin sleppur í land ella umborð á bátarnar, uttan at farið verður gjøgnum hendan bygningin, har strangt eftirlit verður hildið við sóttreinsan.

Í bygninginum verður skift, soleiðis at t.d. eingin sleppur til hús við óreinsaðum arbeiðsklæðum.

–Talan verður um eitt stað, sum verður fullkomuliga avbyrgt frá restini av verðini, sum Atli Gregersen tekur til.

Eisini verður ein sonevnd deyðfiskamóttøka á støðini, greiðir hann frá. Tað fer at virka soleiðis, at umborð á bátinum, har deyði fiskurin verður tikin upp, verður fiskurin sýraður, soleiðis at allar smittur verða dripnar, áðrenn deyði fiskurin so verður koyrdur í eina kvørn, sum melur alt til eina evju, ið verður pumpað í ein tanga á landstøðini, sum ein tangabilur frá móttøkuvirkinum Salmon Proteins á Eiði so kemur og tømir.

Atli Gregersen greiðir frá, at teir á alistøðini Luna á Gøtuvík hava hesa skipanina, og har hevur hon roynst sera væl.

Ringarnir, sum nú beint eftir páskir skulu leggjast út til boyurnar suður frá Hillingartanga, liggja í løtuni inni í havnini beint út fyri har, sum ætlaða landstøðin skal vera. Teir hava verið uppi á landi og eru umvældir og reinsaðir og eru nú klárir at sleipa útaftur. Væntandi fara eisini ringar at koma onkra aðrastaðni frá, sigur Atli Gregersen.

# Byrja aftur at ala í Vágum

**Alistøðin Fútaklettur í Sandavági fer fyrsta dagin at leggja ringar útaftur, og slept verður í teir í næstu framtíð**

ALING
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Fyrsta dagin verða aliringarnir á Sandavági lagdir útaftur, og seinni í vár verður fiskur sleptur í teir.

Tað er alistøðin Fútaklettur í Sandavági, sum fer at seta smolt í ringarnar, sum beint eftir páskir verða sleipaðir úr havnini í Miðvági og lagdir við boyurnar, sum enn liggja á vágni, síðan alt varð har, áðrenn sjúka steðgaði mestsum øllum alivirksemi í landinum.

Atli Gregersen, stjóri á Fútakletti, sigur, at teir fara at seta einar 500.000 - 600.000 fiskar í ringarnar. Teir hava fleiri gangandi á smoltstøðini norðuri á Fútakletti, sigur hann, men hava valt at seta hesa nøgdina út, tí tað tykist rímiliga passandi til tað pláss, ið er. Soleiðis verður fiskurin heldur ikki so strongdur, sum hann hevði verið, um trengri var í ringunum, sigur hann.

Í løtuni arbeiða tey við at koppseta smoltið á støðini á Fútakletti, sigur Atli Gregersen.



*Enn liggja boyurnar so einsamallar á vágni. Men beint eftir páskir fara teir aftur at hefta aliringar í tær*

*Mynd: Edvard Joensen*

## Rætting

Í grein um skúlaavtaluna millum Miðvágs og Sandavágs kommunur í blaðnum í gjár, er eitt brot komið skeivt fyri.

Sagt verður at kommunurnar rinda ávikavist 55 og 45 prosent av rakstrinum.

Har skuldi standa, at Miðvágs Kommuna ber 55 prosent av íløgunum, og Sandavágs Kommuna hini 45 prosentini. Raksturin verður goldin í mun til barnatalið hjá hvørji kommunu sær.

*blðm.*

# Eitt ho

**Nýggjasta hotellið í landinum lat leygardagin dyrnar upp í Runavík. Hóast fyristøðufólkini hava havt stutta tíð til fyrireikingarnar, er líkt til at fólk longu hava givið tí gætur: Í juni mánaði eru ikki nógv kømur eftir at útleiga.**

HOTELLVINNA
*Snorri Brend,*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jan E. Petersen*

**Runavík:** Tey eru ikki óvon við hotellvirksemi, -hjúnini Andreas og Kirstin Andreassen, sum nú hava tikið yvir á Runavíkar Sjómansheimi.

Tey vóru fyri nøkrum árum síðani leiðarar á sjómansheiminum í grønlendska býnum Holsteinsborg. Nú hava tey tikið við avbjóðingini at reka hetta gistingarhúsið í Runavík í framtíðini.

Sum ein part av hesi ætlan hava tey samstundis boðað frá, at navnið á hesum sjómansheiminum verður broytt. Støðið er hækkað innanveggja, og tí

# – Sum at

**Fólk vóru positivt yvirraskað av nýggja hotellinum, tá almenna móttøkan var leygardagin**

HOTELLVIRKSEMI
*Snorri Brend*

**Runavík:** Í lýsingum hevði nýggja fyristøðuparið á hotellinum boðið til almenna móttøku seinasta leygardag.

Fjølmiðlarnir høvdu eisini víst hesum málinum áhuga, og tað sama gjørdu eisini hópurin av fólki.

Dyrnar vórðu lætnar upp á middegi, og vóru fólk nógvastaðni frá og vitjaðu inn á gólvið. Tey hava fyrr vitjað Runavíkar Sjómansheim, men kundu nú á fyrsta sinni trína inn um dyrnar á tí nýggja Hotel Runavík við undirheitinum Sjómansheimið.

Tey, sum ikki høvdu verið á hesum gistingarhúsinum í eina tíð, mundu beinanvegin varnast, at her var stór broyting hend.

Sum ein segði tað: -